FYLGISKJAL 3

STARVSMANNAFELAGIÐ

Tórshavn 24. mai 2018

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes

Viðmerkingar viðv. uppskoti til løgtingslóg at einskilja P/F Postverki Føroya

Hettar eru viðmerkingarnar frá Starvsmannafelagnum til uppskotið til løgtingslóg um at einskilja P/F Postverk Føroya, sum Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur sent til hoyringar.

**Almennar viðmerkingar**
Í prinsippinum heldur Starvsmannafelagið, at politiska skipanin eigur ikki at einskilja almennar tænastur.

Starvsmannafelagið metir, at almennar tænastur eiga ikki at verða einskildar. Góðar almennar tænastur eru ryggurin í vælferðarsamfelagnum, sum vit øll eru við til at fíggja. Einskiljing er eingin trygd fyri at tænasturnar verða betri, men kann harafturímóti skapa ójavnar tænastur.

Skattaborgarans pengar skulu brúkast til at menna og tryggja vælferðartænastur til okkum øll, og ikki at skapa peningaligan vinning til einstaklingar.

At politiska skipanin arbeiðir við at einskilja Posta, eru vit nokk ikki so bilsin um, men at tað júst er henda samgongan, við Javnaðarflokkinum og Tjóðveldi, sum saman við Framsókn leggur uppskoti fyri Tingið, kemur heldur óvart á.

Í 2015 orðaði Starvsmannafelagið 12 kjarnumál, sum felagið vildi varpa ljós á. Í samband við, at 2015 var valár, sendi felagið spurningarnar út til politisku flokkarnar at hoyra hvørja støðu teir høvdu til hesi kjarnumál. Ein av spurningunum snúði seg júst um einskiljing av almennum stovnum og tænastum, har Starvsmannafelagið vísti á, at vit siga Nei til einskiljing.

Tað vóru bara tveir flokkar, sum ikki vóru samdir við okkum í einskiljingarspurninginum og vóru tað Sjálvstýri og Framsókn (Fólkaflokkurin svaraði ikki spurningunum). Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin vóru lutvíst samdir, meðan Tjóðveldi var heilt samt við Starvsmannafelagnum í, at politiska skipanin eigur ikki at einskilja almennar tænastur.

Eftir at Posta varð umskipa til alment partafelag, koyrdi fyritøkan í tungum fíggjarligum sjógvi í nógv ár, men seinastu 5 árini hevur felagið givið yvirskot og tað fegnast vit øll sjálvandi um. Men hví Posta nú, eftir at raksturin koyrir á tryggari grund, skal einskiljast, er ikki til at skilja.

Fyri stuttari tíð síðani var stórt óskil á setanarviðurskiftunum hjá fleiri av starvsfólkunum á Posta, har ivamál vóru um, hvørt setanartreytirnar vóru í samsvari við sáttmálan. Eftir at Starvsmannafelagið fór inn í hesi viðurskiftini, hevur felagið í góðum samstarvi við Føroya Arbeiðsgevarafelag, fingið starvsrættarligu viðurskiftini í rættlag aftur, og síðani tá er trivnaðurin og álitið hjá starvsfólkunum á stovninum aftur uppgangandi.

J. H. Schrøtersgøta 9 • Postsmoga 165 • FR-110 Tórshavn • Tlf. 298 614868 • Fax 298 311092 •
t-post: starvsmannafelag@starvsmannafelag.fo • Heimasíða: www.starvsmannafelag.fo

Vit og starvsfólkini roknaðu við, at nú var arbeiðsfriður og slættur sjógvur á stovninum, so at vit nú kundu líta frameftir. Men gakk, stokkugt var flógva løtan, tí alt hettar um einskiljingina hevur aftur gjørt starvstilveruna hjá okkara limum ótrygga.

Tað kann væl vera, at ein alsamt størri partur av inntøkunum hjá Posta koma frá virkisøkjum, ið ikki eru fevnd av veitingarskyldu landsins; virkisøki, har Posta er í beinleiðis kapping við privat vinnurekandi. Men tað tekur framvegis ikki burtur skylduna hjá landinum, at veita posttænastu til allar borgarar í landinum. So leingi henda skylda liggur hjá landinum, eiga vit at varðveita Posta sum almennan stovn ella í øðrum lagi sum alment partafelag.

Í almennu viðmerkingunum frá Uttanríkis- og Vinnumálaráðunum verður fleiri ferðir nevnt hvat man hevur gjørt í øðrum londum. Til tað er at siga, at fyri tað, um Postverkini í øðrum londum eru privatiseraði – ofta við ivasamari succes – er ikki víst, at tað eisini er tað besta fyri okkara Postverk. Vit eiga og skula hugsa um hvat er best fyri okkara land og fólk, hvat hóskar seg best her hjá okkum og hvørja tænastu vit ynskja at veita okkara borgarum.

Við hesum vil Starvsmannafelagið í fyrsta lagi staðiliga heita á landsstýrissamgonguna um ikki at taka stig til at einskilja Posta.

**Serligar viðmerkingar**
Ger samgongan kortini álvara av ætlanini at einskilja P/F Postverk Føroya, hevur Starvsmannafelagið hesar viðmerkingar til lógaruppskotið, ið er sent til hoyringar:

*Starvsfólkaviðurskiftini mugu greinast*

Talan er um eina ætlan, sum kann fáa stórar avleiðingar fyri starvsfólkini, sum starvast í fyritøkuni.

Kortini er lítið og einki nevnt í uppskotinum um starvsfólkaviðurskiftini og hvussu hesi fara at vera eftir eina møguliga sølu av partapeninginum í P/F Postverki Føroya.

Tað einasta, sum beinleiðis verður nevnt um starvsfólkaviðurskiftini í lógaruppskotinum, er, at starvsfólkini *varðveita í sambandi við søluna síni rættindi sambært verandi sáttmála. Tað verði seg eftir kollektivum sáttmála, sum tænastumenn ella einstaklinga sáttmál við P/F Postverk Føroya.* Í frágreiðingini, sum liggur við uppskotinum, er eingin umrøða av framtíðar starvsfólkaviðurskiftunum.

Viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftunum sigur uppskotið sostatt einki meira enn at staðfesta galdandi rættarstøðuna, um almennu partabrøvini í P/F Postverk Føroya verða seld. Nevniliga, at talan verður um eina universalsuccessión av partabrøvum, har P/F Postverk Føroya fer at hava júst somu rættindi og skyldur eftir søluna av partabrøvum, sum felagið hevði áðrenn søluna av partabrøvum. (sí serligu lógarviðmerkingarnar til § 2)

Starvsmannafelagið heldur, at landið, sum eigari av postverkinum síðani 1976, fyrst av almenna stovninum og síðani 2005 av P/F Postverki Føroya hevur ábyrgd at trygga, at viðurskiftini hjá

starvsfólkunum ikki fara at versna, eftir at partabrøvini eru farin á privatar hendur; ikki bert í sambandi við sjálva søluna, men eisini í tíðini aftaná.

Tað halda vit ikki, at lógaruppskotið borgar fyri, og tí mæla vit staðiliga til, at kor og rættindi hjá starvsfólkunum verða betri tryggjað í lógaruppskotinum og í tilgongdini at selja partapeningin í P/F Postverki Føroya.

*Skipaði viðurskifti*

Starvsfólkini í postverkinum hava øll árini havt væl skipaði rættindi sambært kollektivum sáttmála; tey fyrstu árini í Postfelagnum og síðani 2007 í Starvsmannafelagnum. Heilt fram til 2005 vóru starvsfólkini fevnd av almenna fyrisitingarrættinum, sum tryggjaði teimum serlig setanarrættindi sum alment sett eiga. Hesi rættindi hava tey í ávísan mun varðveitt í teimum kollektivu sáttmálum, sum Postfelagið og síðani Starvsmannafelagið hevur gjørt við Føroya Arbeiðsgevarafelag síðani postverkið gjørdist alment partafelag.

Í 2017 varð miðaltalið av fulltíðarsettum starvfólki á Posta 115 starvsfólk. Meiri enn 80 av starvsfólkunum eru í dag limir í Starvsmannafelagnum. Við tað at fleiri av størvunum á Posta í dag eru akademisk størv, sum liggja uttanfyri sáttmálaøkið, er nógv tann størsti parturin av starvsfólkunum, sum sáttmálin dekkar sostatt limir í Starvsmannafelagnum.

Starvsmannafelagið er í dag einasta fakfelag, sum hevur kollektivan sáttmála fyri P/F Postverk Føroya. Stóra undirtøkan millum starvsfólkini ber greitt boð um, at starvsfólkini í sáttmálaøkinum ynskja skipaði og trygg sáttmálaviðurskifti. Viðurskifti, sum fyrst Postfelagið og síðani Starvsmannafelagið hava verið við til at tryggja og ment.

Viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftunum hevur umleggingin av postverkinum frá almennum stovni til alment partafelag verið alt annað enn løtt. Tað er væl kent, at fyritøkan tey fyrstu árini sum partafelag var merkt av ótryggleika og ófriði millum starvsfólkini. Tað er umráðandi at hendan støða ikki fer at endurtaka seg, um partabrøvini í almenna felagnum verða seld.

Sum eigari av postverkinum í meira enn 40 ár halda vit, at landið hevur sína ábyrgd at tryggja, at ein møgulig søla av partabrøvunum í P/F Postverki Føroya ikki fer at skapa óneyðugan ótta og ótryggleika millum starvsfólkini, sum í stórum tali hava valt at lata seg umboða av okkara felag.

Ein munandi partur av starvsfólkahópinum á Posta fer eisini í komandi árum at verða knýttur at lógarbundnu veitingarskylduni. Eisini hetta halda vit áleggur landinum eina ábyrgd at tryggja, at starvsfólkini, sum eru knýtt at hesum virksemi, ikki fara at uppliva versnaði og óskipaði viðurskifti í árunum eftir eina møguliga sølu.

*Okkara tilmæli*

Við hesum í huga vil Starvsmannafelagið staðiliga heita á landsstýrið um at ásett verður beinleiðis í lógini um at einskilja P/F Postverk Føroya og í sølutilgongdini, at

- komandi keypari/keyparar av partabrøvunum í P/F Postverki Føroya binda seg til at tryggja, at sáttmálaviðurskiftini framhaldandi eru skipaði eftir kollektivum sáttmála við tað fakfelag, sum starvsfólkini taka undir við, og at
- komandi keypari/keyparar binda seg til, at minsturættindini viðvíkandi løn- og arbeiðskorum ikki verða skerd, tá ið nýggjur kollektivur sáttmáli skal gerast.

Sum einasta fakfelag við kollektivum sáttmála fyri Posta, fer Starvsmannafelagið at fylgja hesum málinum neyvt. Vit hava allatíðin tætt samband við limirnar og álitisfólkaskipanina á Posta um hettar mál, og kunna tey um gongina.

Starvsmannafelagið hevur í vár havt kunnandi fund við embætisfólk í Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum um hettar lógaruppskot. Vit seta okkara álit á, at vit, sum vara av starvsfólkunum, verða tikin fult við upp á ráð í tilgongdini, um eitt uppskot at einskilja P/F Postverk Føroya gerst veruleiki.

Vit vilja gera vart við, at vit eru altíð til reiðar at hava fund við Uttanríkis- og Vinnumálaráðið og landsstýrið, so hvørt tørvur verður á tí.

Vinarliga

Súni Selfoss, formaður
Starvsmannafelagið